# Nógv fólk til Uriah Heep kvøld á Tvøroyri

**Seinasta leygarkvøld varð skipað fyri Uriah Heep kvøldi á Seglhúsloftinum á Tvøroyri**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fróði Vestergaard, sum var ein av fyriskiparunum, letur sera væl at kvøldinum.

- Eg kann siga at kvøldið var serstakliga væleydnað. Útselt var til borðhaldið, og Anna Kirstin hevði gjørt eina sera vælsmakkandi buffet, greiðir Fróði Vestergaard frá.

Tiltakið byrjaði klokkan 21, og kokkan 23 byrjaði framførslan hjá tónleikabólkinum Deiggj - og vardi hon í einar tveir tímar.

- Eg haldi, at hetta var ein tann besta áhoyrarafljøð, vit hava havt í l langa tíð, eitt nú var føroya løgmaður, Kaj Leo Johannesen, sum er gamal heepfjeppari, komin suður at hugna sær saman við góðum vinmonnum, sigur Fróði Vestergaard.

Umleið helvtin av teimum, sum vóru á Seglloftinum, vóru fólk sum ikki vóru búsitandi á Tvøroyri. Fleiri vóru norðanífrá.

Vit spældu til klokkan fýra sunnumorgun og takkaðu fyri eitt gott vikuskiftið. Møguliga fara vit at ferðast runt í Føroyum við hesum Uriah Heep kvøldunum, sigur ein væl nøgdur Fróði Vestergaard.




*Deiggj framførdi í einar tveir tímar við Uria Heep løgum, meðan fólk hugnaðu sær við borðini á Seglhúsloftinum. Hildið varð á til klokkan fýra sunnumorgunin*





*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, er gamal Uria Heep-fjeppari, og hann hevði leitað sær suður á Tvøroyri seinasta leygakvøldið til Uria Heep kvøldið við Deiggj á Seglhúsloftinum*

# Sebastian SOLO í Norðurlandahúsinum

**Fólkakæri danski trubadururin, Sebastian, kemur aftur Føroya at hava konsert í Norðurlandahúsinum. Sebastian er í løtuni á konsertferð í Danmark, og allastaðni eru konsertirnar útseldar, og fleiri eykakonsertir mugu fyriskipast**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv frá Norðurlandahúsinum*

Sebastian var í Føroyum í 2006. Hann hevði tá eina sera væleydnaða konsert í Norðurlandahúsinum. Fólk vóru ovfarin og hugtikin. Hann hevði tá verið burtur frá danska »live tónleikapallinum« í næstan 10 ár.

## Sebastian er nakað heilt serligt

Sebastian er nakað heilt serligt. Røddin er meira rustað og ikki tann sama, sum hon var á yngru døgum, men tað hevur als ongan týdning, og ger hann ikki verri, tí Sebastian er so nógv annað enn bara rødd. Sebastian er ein framúr góður gittarleikari, hann hevur speisemið og sjálvironi og dugir við sínum serliga máta at framføra at rúnarbinda áhoyraran sum fáur. Hann dugir kynstrið, at fortelja eina søgu og so hevur hann skrivað nøkur fantastisk løg og teksti, sum hoyra millum til tey allbestu løgini sum danir hava skrivað í nýggjari tíð.

Sebastian hevur eisini havt ávirkan á nógv menniskju bæði danir og føroyingar. Hann hevur skrivað eina rúgvu av hittum, sangleikir, filmstónleik t.d. sangleikin »Ronja Ránsmannadóttir«, sum varð framførdur í Føroyum. Hann hevur eisini skrivað sangleikin Skattaøen og Pippi.

## Eitt ótal av landaplágum

Hvør kennir ikki sangirnar »Du er ikke alene«, »Du lille barn«, »80'ernes Boheme«, »Du Er Ikke Alene«, »Rose«, »Den Lille Malkeko«, »Romeo« og »Når Lyset Bryder Frem«, »Hodja fra Pjort«, »Her er sang«, »Måske ku vi«, »Stille før storm« og vit kunnu halda áfram í óendaligheit.

Konsertin hjá Sebstian verður týskvøldið 27 apríl í Norðurlandahúsinum.

heimasíðan: http://www.sebastian.info

*Sebastian Fólkakæri danski trubadururin, Sebastian*

